

# Ársroknskapur og ársfrágreiðing 2007

# Ársroknskapur og ársfrágreiðing 2007

Uppseting og myndir: Vasti • Prent: Estra

# Innihald


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagsskapin | 6 |
| IRF 2007 | 7 |
| Limakommunur og fólkatal | 8 |
| Leiðsluátekning | 9 |
| Grannskoðanarátekning | 11 |
| Formansfrágreiðing | 12 |
| Búskapur | 18 |
| Høvuðstøl | 18 |
| Frágreiðing til ársroknskapin | 20 |
| Rakstrarroknskapur 2007 | 21 |
| Fíggjarstøða pr. 31.desember 2007 | 22 |
| Notur til roknskapin | 23 |
| Rakstrarúrslit samanborið við ætlan 2007 | 34 |
| Gjaldførisfrágreiðing 2007 | 35 |
| Gongdin í rakstrinum 1999-2007 | 36 |

# Upplýsingar um felagsskapin

**Felagsskapurin:**

| | |
|---|---|
| Navn: | L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF |
| Bústaður: | 520 Leirvík |
| Heimstaðarkommuna: | Leirvíkar Kommuna |
| Arbeiðsgevaratal: | 353.477 |
| Stovningarár: | 1979 |
| Starvsfólk: | 65 |
| E-mail | irf@irf.fo |
| Tlf. | 414243 |
| Fax | 414244 |

**Nevnd:**

Regin Jacobsen, Eysturoy, formaður
Johannes Klein, Vágar, næstformaður
Palli á Lava Olsen, Sandoy
Soffi Egholm, Streymoy
Rani Nolsøe, Norðoyggjar
Bergur Bærendsen, Suðuroy



**Stjórn:**

Poul Andrias Joensen, stjóri – poul@irf.fo
Erik Lervig, fíggjarleiðari – erik@irf.fo

**Grannskoðari:**

P/F Grannskoðaravirkið **INPACT**
R.C.Effersøesgøta 26
Boks 191
FO-110 Tórshavn
Tel. 314700
Fax 313815
inpact@inpact.fo.
www.inpact.fo

Ársroknskapurin fyri 2007 er góðkendur á ársaðalfundinum tann ____________ 2008

______________________________

Fundarstjóri

# IRF Fyriskipan 2007

33 Limakommunur

Aðalafundur

Nevnd



Regin Jacobsen
*formaður*



Johannes Klein
*næstformaður*



Palli á Lava Olsen



Soffi Egholm



Rani Nolsøe



Bergur Bærendsen



Poul Andrias Joensen
*stjóri*



Erik Lervig
*fíggjarleiðari*



Ingvard Fjallstein
*umhvørvisleiðari*

Innsavning meginøkið & Sandoy

Brennistøð & Spilloljuverk

Suðuroy

Rottangaskipanin

Verkstaður



Jógvan Júst Olsen

Innsavning
· Húsarhald
· Virki
Bingjupláss
Flutningur
Bingjur



Jákup Petur Johannesen

Móttøka
Brenning
Viðlíkahald



Martin Andrias (Diaba) Johannesen

Innsavning
· Húsarhald
· Virki
Bingjupláss
Umlastingarstøð
Tyrvingarpláss



Adelbert Ellingsgaard

Móttøka
Innsavning



Petur Højgaard

Bilar
Bingjur
Maskinur

# Limakommunur og fólkatal

| Kommuna | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | Primo 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eiðis Kommuna | 687 | 705 | 720 | 727 | 717 | 719 | 711 | 703 | 695 |
| Fámjins Kommuna | 116 | 111 | 113 | 111 | 111 | 115 | 118 | 114 | 111 |
| Fuglafjarðar Kommuna | 1.495 | 1.546 | 1.587 | 1.591 | 1.591 | 1.575 | 1.568 | 1.585 | 1.545 |
| Fugloyar Kommuna | | | 48 | 45 | 46 | 45 | 44 | 44 | 43 |
| Funnings Kommuna | 96 | 90 | 85 | 79 | 83 | 83 | 83 | 75 | 77 |
| Gøtu Kommuna | 960 | 969 | 1.005 | 1.032 | 1.043 | 1.072 | 1.068 | 1.063 | 1.074 |
| Hovs Kommuna | 121 | 121 | 123 | 133 | 132 | 131 | 126 | 125 | 119 |
| Húsa Kommuna | 60 | 62 | 63 | 68 | 62 | 57 | 61 | 61 | 60 |
| Húsavíkar Kommuna | 152 | 141 | 141 | 140 | 140 | 141 | 133 | 131 | 129 |
| Hvalbiar Kommuna | 780 | 764 | 762 | 765 | 771 | 778 | 763 | 766 | 759 |
| Hvannasunds Kommuna | 443 | 449 | 447 | 453 | 446 | 449 | 454 | 441 | 435 |
| Klaksvíkar Kommuna | 4.757 | 4.856 | 4.854 | 4.873 | 4.920 | 4.902 | 4.879 | 4.884 | 4.888 |
| Kunoyar Kommuna | 136 | 141 | 133 | 134 | 135 | 141 | 148 | 157 | 160 |
| Kvívíkar Kommuna | 561 | 563 | 589 | 580 | 594 | 607 | 606 | 616 | 606 |
| Leirvíkar Kommuna | 816 | 821 | 826 | 865 | 885 | 856 | 865 | 873 | 889 |
| Miðvágs Kommuna | 953 | 973 | 1.001 | 1.020 | 1.060 | 1.089 | 1.096 | 1.096 | 1.107 |
| Nes Kommuna | 1.113 | 1.170 | 1.169 | 1.197 | 1.223 | 1.217 | 1.221 | 1.242 | 1.248 |
| Nólsoyar Kommuna | 259 | 262 | 268 | 268 | 262 | | | | |
| Porkeris Kommuna | 359 | 359 | 379 | 373 | 367 | 359 | 346 | 332 | 338 |
| Runavíkar Kommuna | 3.302 | 3.391 | 3.457 | 3.521 | 3.611 | 3.647 | 3.634 | 3.672 | 3.679 |
| Sandavágs Kommuna | 688 | 684 | 693 | 723 | 730 | 738 | 765 | 795 | 805 |
| Sands Kommuna | 562 | 554 | 600 | 578 | 587 | 599 | 586 | 589 | 577 |
| Sjóvar Kommuna | 1.003 | 1.023 | 1.029 | 1.042 | 1.043 | 1.043 | 1.029 | 1.028 | 1.019 |
| Skálavíkar Kommuna | 163 | 171 | 191 | 181 | 203 | 184 | 180 | 184 | 176 |
| Skopunar Kommuna | 488 | 493 | 480 | 496 | 497 | 480 | 487 | 508 | 508 |
| Skúvoyar Kommuna | 86 | 86 | 81 | 62 | 68 | 62 | 60 | 57 | 60 |
| Sørvágs Kommuna | 960 | 982 | 1.028 | 1.061 | 1.084 | 1.084 | 1.071 | 1.072 | 1.098 |
| Sumbiar Kommuna | 403 | 407 | 432 | 433 | 414 | 391 | 379 | 383 | 379 |
| Sunda Kommuna | 1.363 | 1.366 | 1.445 | 1.488 | 1.517 | 1.560 | 1.560 | 1.565 | 1.591 |
| Svínoyar Kommuna | | 63 | 61 | 73 | 58 | 55 | 55 | 52 | 48 |
| Tvøroyrar Kommuna | 1.789 | 1.829 | 1.846 | 1.867 | 1.850 | 1.836 | 1.807 | 1.823 | 1.802 |
| Vágs Kommuna | 1.403 | 1.375 | 1.417 | 1.450 | 1.433 | 1.431 | 1.409 | 1.403 | 1.417 |
| Vestmanna Kommuna | 1.211 | 1.237 | 1.240 | 1.237 | 1.240 | 1.241 | 1.228 | 1.235 | 1.227 |
| Viðareiðis Kommuna | 317 | 321 | 337 | 347 | 342 | 341 | 345 | 339 | 352 |
| **Tilsamans** | **27.602** | **28.085** | **28.650** | **29.013** | **29.265** | **29.028** | **28.885** | **29.013** | **29.021** |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin við ársfrágreiðingini fyri 2007 hjá L/F Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum IRF.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Ársfrágreiðing og ársroknskapur felagsskapsins fyri 2007 verður hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Leirvík, hin 14.03.2008

Stjórn

| | |
|---|---|
| Poul Andrias Joensen | Erik Lervig |
| *stjóri* | *fíggjarleiðari* |

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| Regin Jacobsen | Johannes Klein | Palli á Lava Olsen |
| *formaður* | *næstformaður* | |
| Soffi Egholm | Rani Nolsøe | Bergur Bærendsen |



# Átekning frá óheftum grannskoðara



Til eigararnar í L/F Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum IRF

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá L/F Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum IRF fyri roknskaparári 1. januar - 31. desember 2007.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

## Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2007 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2007.

Leirvík hin 14.03.2008

P/F Grannskoðaravirkið **INPACT**
statsaut. revisorar

| Jógvan Amonsson<br>statsaut. revisor | Eilif Petersen<br>skrás. grannskoðari |
|---|---|





# Formansfrágreiðing

Við IRF á odda megnar føroyska samfelagið á ein burðardyggan hátt at handfara ta alsamt vaksandi nøgdina av burturkasti.

IRF tryggjar eisini, at einki øki í landinum verður forsømt, tá ið talan er um innsavning og flutning av burturkasti í Føroyum.

Eitthvørt modernað samfelag er treytað av eini effektivari burturbeiningarskipan. Samstundis áliggur tað okkum at skipa so fyri, at so nógv av burturbeiningini sum gjørligt kann endurnýtast.

Avbjóðingarnar hjá IRF eru sostatt:

1. at tryggja eina nóg stóra brenniorku, soleiðis at virkir og borgarar, í okkara limakommunum, ongantíð hava trupulleikar at sleppa av við sítt burturkast
2. at tryggja at vit alla tíðina endurnýta mest møguligt av burturkastinum
3. at vandamikið burturkast verður handfarið uttan ampa fyri fólk og samfelag
4. at alt útlát frá IRF heldur øll altjóða krøv

Gongdin í samfelagnum á umhvørvisøkinum er nógv broytt seinastu árini, og eru nógvar uppgávur fyri framman at taka støðu til. Serliga eru tað lógarkravdar íløgur og neyðugar íløgur fyri at økja um móttøkuorkuna.

Móttøkuorkan á Brennistøðini á Hagaleiti hevur verið ov lítil síðani 1998. Tá bleiv avtalað gjørd við Tórshavnar Kommunu, um at brenna nakað av burturkastið á KB. Síðani tá hevur IRF sent millum 400 og 2.800 tons árliga til KB.

Nøgdin av burturkasti í Tórshavnar kommunu er tó vaksin so mikið nógv seinastu árini, at tað hevur verið trupult hjá IRF at sloppið av við nóg mikið av burturkasti til KB. Móttøkuorkan hjá IRF hevur av somu orsøk verið alt ov lítil seinastu árini.

IRF hevur havt fund við umboð fyri Tórshavnar Kommunu um støðuna við ov lítlari brenniorku. Endamálið við fundinum var at kanna møguleikarnar fyri samanlegging av KB og IRF við tí fyri eyga at byggja eina nýggja felags Brennistøð fyri alt landið. Áhugin frá Tórshavnar Kommunu var tó so mikið lítil, at nevndin hevur valt ikki at arbeiða víðari við hesum møguleikanum, men heldur at kanna møguleikan fyri at økja um brenniorkuna á Hagaleiti.

## Búskaparliga gongdin

Rakstrarúrslitið fyri 2007 er munandi betri enn í 2006. Inntøkurnar eru uml. 10,1 mió., hægri enn í 2006 meðan útreiðslurnar eru uml. 4,8 mió. hægri enn í 2006. Hækkaðu inntøkurnar stava í høvuðsheitum frá virkjum og sølu av endurnýtslutilfari og jarni. Í 2006 var jarnið sent til KB meðan tað í 2007 er selt til Danmarkar. At útreiðslurnar eru hægri kemst serliga av hækkandi flutningsútreiðslum, m.a. útflutningur av jarni og vandarmiklum umframt útflutningur av restproduktum. Lønarútreiðslurnar eru eisini hækkaðar nakað samanborið við 2006.

Samlaðu íløgurnar í 2007 vóru 7,9 mió. kr. harav 3,3 mió. kr vóru íløgur á brennistøðini og 3,3 vóru íløgur í bilar.

## Limagjaldið

Limagjaldið er samansett av tveimum gjøldum, sum verða nevnd ruskgjald og rottangagjald. Limagjaldið hevur verið óbroytt seinastu trý árini.

Nevndin mælir nú til at hækka limagjaldið frá 1. januar 2009. Mælt verður til at hækka ruskgjaldið úr 1.230,- til 1.290,- kr fyri hvønn íbúgva og at hækka rottangagjaldið úr 140,- til 170,- kr. fyri hvønn íbúgva.

At neyðugt er at hækka limagjaldið, kemst m.a. av prísvøkstri, herdum lógarkrøvum og neyðugum íløgum komandi árini.

## Brennistøðin

Nýggja roykreinsiskipanin, sum bleiv tikin í nýtslu á sumri í 2006, hevur hóast byrjunartrupulleikar roynst væl. Kanningar av roykinum vísa, at Brennistøðin yvirheldur øll markvirðir, ásett eru í umhvørvisgóðkenningini.

Í desember í fjør sendu vit fyri fyrstu ferð roykburturkast av landinum til NOAH í Noreg. Talan var um 1.140 tons tilsaman frá bæði IRF og KB.

Trupulleikin við ov lítlari brenniorku er til stóran ampa fyri okkara limakommunur, virki, handlar og húsarhald. Støðan kemur uttan iva at versna komandi árini, um ikki okkurt munagott verður gjørt fyri at økja um brenniorkuna á Hagaleiti.

Vit hava tí biðið Babcock & Wilcox Vølund Aps gjørt eina sokallaða CFD-kanning av ovninum. Kanningin vísir, at tað tekniskt ber til at út- og umbyggja ovnin og at økja um brenniorkuna við uml. 0,7 tonsum, sum svarar til eina hækking upp á umleið 30%, ella 5.600 tons um árið.

Út frá CFD-kanningini hava vit biðið Babcock & Wilcox Vølund Aps komið við einum tilboði upp á at um- og útbyggja ovnin. Umbyggingin kemur at taka uml. 10 vikur.

Meðan umbyggingin verður framd, kemur IRF at taka ímóti uml. 4.000 tons av busturkasti, sum má leggjast á goymslu og síðani brennast á Hagaleiti ella sendast av landinum at brenna.

Samlaði kostnaðurin av at um- og útbyggja ovnin er mettur til uml. 30 mió. kr, sum ætlanin er at fíggja við lántøku.

Arbeiðið kann byrja síðst í 2008 ella fyrst í 2009.

**Burturkast til Brennistøðina seinastu 4 árini**




| Ár | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|
| | 1.000 | 700 | | |
| | | 922 | | |
| | 867 | 410 | 1.173 | 2.164 |
| | 16.962 | 15.744 | 16.100 | 16.116 |

Timbur á goymslu — Brent uttanlanda — KB — IRF

## Jarn og metal

IRF tekur ímóti jarni og metali frá limakommununum og virkjum í IRF økinum, skilur og viðger tað, áðrenn tað verður sent til jarnmóttøkuna hjá Tórshavnar Kommunu ella sent beinleiðis av landinum til endurnýtslu.

Bilvrak mugu fólk sjálvi koyra til Havnar. Suðuroyingar kunnu tó lata bilvrakini til umlastingarstøðina í Trøllavík. IRF skipar so fyri flutninginum til Havnar.

Arbeitt verður við ætlanum um at útbyggja Umlastingarstøðina hjá IRF á Gjánoyri. Ætlanin er at byggja goymslu til jarn og metal, køli- og frystiskáp, dekk og timbur.

Samráðingar eru við Sunda Kommunu um at leingja leigusáttmálan.

## Spilloljuverkið á Kambsdali

Spilloljuverkið á Kambsdali, sum IRF rekur eftir sáttmála við Føroya Landsstýri, tekur ímóti uml. 3.500 $m^2$ av spillolju og øðrum oljutilfari árliga. Tað átti sostatt at verið ein týðandi viðspælari, tá talan er um eitt reint og heilt umhvørvi. Men sera illa gongur at fáa neyðuga peningin játtaðan til at umbyggja og nútímansgera Spilloljuverkið fyri. Sum støðan er í dag, megna vit ikki at halda settu krøvini til útlát, móttøkuorkan er alt ov lítil, teknikkurin ótíðarhóskandi og Spilloljuverkið liggur ov tætt upp at sethúsaøkinum á Kambsdali.

Avtala er gjørd við Føroya Landsstýri um at projektera nýtt Spilloljuverk á Hagaleiti, tætt upp at Brennistøðini. Endamálið við hesum er at nýta hitan frá Brennistøðini til viðgerð av spilloljuni, eins og til ber at integrera raksturin við tann á Brennistøðini. Avtalað er eisini um, at neyðugur peningur skuldi setast av til endamálið á fíggjarlógini í 2008.

Reinsaða oljan verður eins og undanfarin ár seld til Fjarhitafelagið í Tórshavn, Havsbrún í Fuglafirði og Høvdavirkið í Leirvík.

## Rottangaskipanin

Seinasta árið hevur IRF arbeitt við tveimum møguleikum til endaviðgerð av rottangaevjuni. Annar møguleikin er at brenna evjuna, meðan hin er ein kombinerað loysn við kálkstabilisering og síðani kompostering av evjuni. Í báðum

førum skal evjan reinsast fyri plast og annað óviðkomandi tilfar, áðrenn hon kann brennast ella komposterast.

Fyrimunurin við at brenna evjuna eru, at evjunøgdin minkar munandi. Eftir er bert øskan, sum verður tyrvd. Til ber eisini at brenna aðra evju, frá t.d. uppsamlingsbrunnum á fiskavirkjum o.l. Vansin við at brenna evjuna er m.a., at hetta minkar um tøku brennuorkuna.

Fyrimunurin við kompostering er, at endatilfarið kann nýtast til ymisk endamál, og um ikki annað, blandast upp í moldina á kommunalu moldgoymslunum. Ein annar fyrimunur er, at greinar og reint timbur, sum í dag verður brent, skulu blandast upp í evjuna.

Í mun til at brenna evjuna minkar hetta um burturkastnøgdina til Brennistøðina við uml. 500 tonsum av timbri og uml. 1.000 tonsum av evju.

Skipanin er ætlað til meginøkið.

**Tyrving seinastu 4 árini**




| Ár | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Annað | 9.440 | 362 | 728 | 179 |
| Sót | 0 | 82 | 131 | 131 |
| Øska | 2.126 | 1.707 | 2.058 | 2.365 |

## Tyrving

Arbeitt verður við at víðka nakað um tyrvingarplássið í Oyndarfirði, og vóna vit, at hetta arbeiðið kann byrja fyrst í 2009.

Eftir oljuóhappið á Vágsverkinum kom so mikið nógv av oljudálkaðum tilfari á tyrvingarplássið í Trøllavík, at plássið nú nærum er fylt og bert kann nýtast í fá ár afturat.

Arbeitt hevur verið við at útbyggja tyrvingarplássið í Junkarahaganum omanfyri Kvívík. Kanningar av plássinum verða gjørdar, samstundis sum arbeitt verður við at fáa øll neyðug loyvir upp á pláss.

## Tilbúgving

Við minni enn einum ári ímillum vóru tvey óhapp, har stór oljudálking kundi staðist av. Í desember 2006 kom leki á 2.800 rúmmetur stóra tungoljutangan hjá SEV í Vági, og í august 2007 sakk russiski trolarin Olshana á Tangafirði við 300 tonsum av olju umborð.

Í fyrra førinum varð dálkingin avmarkað, tí tað eydnaðist at fáa oljuna úr tanganum og at byrgja mistu oljuna inni. Bilar frá IRF vóru skjótir á staðnum og fingu sogið nakað av heitu tungoljuni upp. Seinni blivu 4.480 rúmmetrar av oljudálkaðum gróti fluttir á tyrvingarplássið hjá IRF í Trøllavík. Hetta skapti trupulleikar við rakstrinum av plássinum, umframt at plássið bleiv fylt.

Í seinna førinum liggja 300 tons av olju á botni á Tangafirði. Í hesum førinum blivu bilar frá IRF eisini tilkallaðir, og var ein bilur umborð á Sam, meðan Olshana stóð á Flesjunum. IRF tók ímóti 52 $m^2$ av oljusperringum úr Sundalagnum og av Skálafjørðinum, sum vóru brendar. IRF var eisini við í ætlanunum um at taka oljuna upp.

Tað er neyðugt at gera púra greitt, at Spilloljuverkið á Kambsdali, sum IRF rekur í samstarvi við Føroya Landsstýri, ikki á nakran hátt hevði kunna tikið ímóti størri nøgdum av oljudálkaðum vatni ella sjógvi, um verri hevði vilja til í hesum báðum førum. Verkið hevur hvørki goymsluorku ella viðgerðarorkum til tess. Tað ríður um snarið til dagliga raksturin.

IRF hevur við jøvnum millumbilum tey seinastu 8 árini gjørt Føroya Landsstýrið vart við henda trupulleika. Har-



afturat hava vit eisini gjørt Føroya Landsstýri vart við, at verkið ikki lýkur umhvørviskrøvini. IRF má bara staðfesta, at tað hevur ikki verið politiskur vilji til at loyst hetta málið, hóast tað bert kostar eina góða millión eyka um árið á landsins fíggjarlóg.

Sum nevnt frammanfyri, so er tað ikki bert vatn ella sjógvur, sum kann vera oljudálkað. Tað kunnu eisini verða stórar nøgdir av oljudálkaðum gróti ella oljudálkaðari mold, sum skulu fáast til høldar, umframt stórar nøgdir av oljufyltum oljusperrum og øðrum absorbentum, sum skulu brennast. IRF metir, at tað hevur hast, at fáa loyst hesi mál.

## Endi

Tað er okkara vón, at limakommunurnar taka undir við ætlanunum at økja um brenniorkuna á Hagaleiti, og at útbyggingin kann byrja síðst í ár ella fyrst í komandi ári. Gera vit einki, men bert lata standa til, verður uttan iva neyðugt at flyta burturkastið av landinum, sum er ein nógv dýrari og meira arbeiðskrevjandi loysn enn at byggja út.

Eftir útbyggingina rokna vit við, at brenniorkan hjá IRF verður nóg stór eini 10 ár fram í tíðina. Hetta krevur tó, at vit framhaldandi arbeiða við at útbyggja og menna okkara endurnýtsluskipanir.

## Hagtøl

Øll skráseting av móttiknum burturkasti, undantikið serliga dálkandi burturkast, verður gjørd í $m^3$. Í summum førum eru rímuliga álítandi umrokningarbrot til vekt, í øðrum førum minni álítandi. Brenniburturkast verður vigað inn í ovnin. Í sambandi við útflutning av burturkasti stavar vektin frá móttakaranum.

**Endurnýtsla seinastu 4 árini**




| Ár | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Pappír og papp | 1.912 | 1.817 | 1.539 | 1.408 |
| Háorkuburturkast | 220 | 103 | 348 | 145 |
| Jarn og metal | 2.396 | 2.439 | 2.403 | 3.743 |
| Bilar | 139 | 129 | 228 | 282 |
| Elektronikkur | 120 | 97 | 62 | 56 |
| CFC-burturkast | 80 | 48 | 65 | 0 |
| Spilloljusøla | 1.315 | 1.308 | 1.195 | 1.252 |

## Endurvinning

Endurvinning av burturkasti umfatar innsavning og útflutning av pappíri, plasti, metalum og elektronikki. Harafturat verður spillolja innsavnað, reinsað og brúkt í Føroyum roknað sum endurvunnið burturkast.

## Pappír og papp

Skiljihøllin á Hagaleiti tekur ímóti pappíri og pappi úr limakommununum og Tórshavnar Kommunu. Í 2007 tók Skiljihøllin ímóti knøppum 24.000 $m^3$, harav 8.975 $m^3$ komu úr Tórshavnar Kommunu. Samanlagt ein vøkstur upp á 9,6% í mun til 2006.

Samlaði útflutningurin av pappíri og pappi var 1.912 tons. Hetta er ein vøkstur upp á 5,2% í mun til 2006 (Talva 1).

## Háorkuburturkast

Burturkast av plasti og gummi verður roknað sum háorkuburturkast. Talan er um bildekk, stórar plastsekkir og trol- og garnaleivdir. Í 2007 vórðu 220 tons av plast- og gummiburturkasti útflutt (Talva 1).

Sum nevnt í seinastu frágreiðing, eru stórir trupulleikar at sleppa av við trolnet til endurnýtslu, tí so nógvur sandur er í netinum. Tí blivu 1.130 $m^3$ av trolneti tyrvdir.

IRF hevur umleið 2.000 $m^3$ av dekkum og øðrum gummi á goymslu. Ein stórur partur er persónbiladekk, sum kunnu endurvinnast, men tað kostar kr. 700 fyri tonsið umframt flutningskostnað. Restin má brennast.

## Jarn og metal

IRF tók ímóti góðum 8.500 $m^3$ av jarni í 2007. Hetta er ein triðingur minni enn árið fyri, men nógv jarn lá á goymslu um árskiftið 2006/2007. Í fjør vórðu 4.400 $m^3$, svarandi til 993 tons, av jarni avskipað beinleiðis til móttakara uttanlands. Harafturat vórðu sløk 3.600 $m^3$ avskipað til Jarnplássið á Hjalla. Hetta er meira enn helvtina minni enn undanfarin ár. Høvuðsgrundin til hesar broytingar er góði marknaðarprísurin fyri brúkt jarn og metal. Samlaða avskipingin var 2.396 tons, sum er nakað tað sama sum árið fyri. Um 1.000 $m^3$ av jarni lógu á goymslu um árskiftið.






**Talva 1. Endurnýtsla av burturkasti**

*Tølini eru avskipað nøgd*

| Tilfar | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Pappír og papp, tons | 1.912 | 1.817 | 1.539 |
| Háorkuburturkast, tons | 220 | 103 | 348 |
| Jarn og metal, tons | 2.396 | 2.439 | 2.403 |
| Bilar móti endurgjaldi, stk. | 132 | 123 | 217 |
| Elektronikkur, tons | 120 | 97 | 62 |
| CFC-burturkast, tons | 80 | 48 | 65 |
| Spilloljusøla, $m^3$ | 1.512 | 1.503 | 1.374 |

Talið av bilvrakum við skrásetingarskjølum var 132 í 2007. Hetta eru bilvrak, sum IRF tekur ímóti og avgreiðir endurgjald til móttakaran. Talið er munandi lægri tey bæði seinastu árini enn árini frammanundan. Hetta kemst fyri ein stóran part av, at norðingar nú eisini avgreiða bilvrakini sjálvir (Talva 1).

## Elektronikkur

Nøgdin av elektroniskum burturkasti veksur alsamt. Í 2007 útflutti IRF 120 tons av elektroniskum burturkasti. Tað er ein vøkstur upp á góð 23% í mun til 2006. Ein stórur partur stavar frá sjónvørpum og teldum (Talva 2)

**Talva 2. Dømi um innsavnað elektroniskt burtukast**

*Tølini eru stykkir*

| Tilfar | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Sjónvørp | 1.122 | 1.004 | 732 |
| Telduhúsar | 1.044 | 654 | 510 |
| Telduskermar | 1.211 | 867 | 573 |
| Tastatur | 803 | 461 | 317 |
| Dustsúgvarar | 707 | 518 | 455 |
| Hátalarar | 1.417 | 771 | 630 |

Tær vanligu hvítvørurnar verða enn ikki roknaðar upp í elektroniskt burturkast, sum annars í ES, men verða roknaðar upp í jarn og metal ella CFC-burturkast. (Talva 1). Í 2007 var nøgdin av CFC-burturkasti, sum er kuldaskáp og frystiboksir, 79,5 tons í mun til 48,2 tons í 2006.

## Spillolja

Spilloljuverkið á Kambsdali tók ímóti 3.461 rúmmetrum í 2007, sum er nakað tað sama sum í 2006. Sølan av reinsaðari spillolju var 1.512 rúmmetrar í 2007, sum eisini er nakað tað sama sum í 2006 (Talva 1).

## Brenning

Brennistøðin var í rakstri í 7.987 tímar í 2007, sum eru 549 tímar fleiri enn í 2006. Tilsamans vórðu 17.829 tons av burturkasti brend úr IRF limakommununum í fjør, harav 867 vórðu brend á Kommunalu Brennistøðini í Tórshavn (Talva 3). Harafturat liggja 1.000 tons av timbri á goymslu.

Brennistøðin veitti 17.659 MWh av fjarhita til Faroe Marine Products, Høvdavirkið, í 2007. Tað svarar til ein mátt upp á 2,21 MW hvønn tíma brennistøðin var í rakstri.

Bert 21 tons av roykburturkasti lógu á goymslu um árskifti.

**Talva 3. Brenning av burturkasti**

| | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Brenning, tímar | 7.987 | 7.438 | 7.569 |
| Brent hjá IRF, tons | 16.962 | 15.744 | 16.199 |
| Brent hjá KB, tons | 867 | 410 | 1.173 |
| Brent í Danmark, tons | 0 | 922 | |
| Brent í alt, tons | 17.829 | 17.106 | 17.372 |
| Brent IRF, tons/tíma | 2,12 | 2,10 | 2,14 |
| Veittur fjarhiti, MWh | 17.659 | | |
| Roykburt. á goymslu, tons | 21 | 190 | |

### Tyrving

Óvanliga nógv tilfar varð tyrvt á tyrvingarplássinum í Oyndarfirði, í Bø og í Trøllavík í 2007. Høvuðsgrundin til stóru økingingina var oljuóhappið í Vági, sum førdi, til at 8.512 tons av oljudálkaðum gróti vórðu løgd á Tyrvingarplássið í Trøllavík (Talva 4). Harafturat kom nógv tyrvingartilfar frá niðurtøka av stórum bygningi og innanhýsis upprudding, t.d. gomul trol. Tilsaman vórðu 11.716 tons tyrvd í 2007.

**Talva 4. Tyrving av burturkasti**

| Tilfar | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Ilska, tons | 2.126 | 1.707 | 2.058 |
| Flogøska, tons | 0 | 82 | 131 |
| Annað, tons | 9.590 | 362 | 728 |

### Serliga dálkandi burturkast

Nøgdin av avskipaðum akkumulatorum hevur ligið millum 80 og 100 tons um árið í fleiri ár. Nú prísurin á blýggi er hækkaður munandi, eru aðrir móttakarar farnir at gera vart við seg. Hetta sæst væl aftur, tí IRF avskipaði bert 35,9 tons av akkumulatorum í 2007.

Nøgdin av máling hækkar, meðan nøgdin fotovesku var munandi lægri í 2007 enn í 2006 (Talva 5). Hetta kemur fyri ein stóran part av, myndaviðgerðin á sjúkrahúsum verður digitaliserað.

Alt spilloljuslammið frá Spilloljuverkinum, og nakað av spillivatni frá oljuborðingini í 2006, varð sent av landinum til viðgerðar í fjør, tilsaman góð 185 tons.

IRF og Kommunala Brennistøðin samstarva um goymslu av roykburturkasti. Goymslan er í høll á havnalagnum í Hvalvík. Nakað av tvídrátti tók seg upp um, hvør skuldi verða játtandi myndugleiki, tá burturkastið varð flutt út, tí flutningurin skal gerast sambært ávísari ES-fyriskipan. Hetta seinkaði avskipingini munandi. Í desember 2007 vórðu 1.144 tons av roykburturkasti frá báðum brennistøðunum send til NOAH í Noregi til viðgerðar. Parturin hjá IRF var 686,4 tons. Tað svarar til 40 tons um mánaðin teir fyrstu 17 mánaðirnar. Tað kostar brennistøðunum umleið 1200 kr. fyri tonsið at goyma, avskipa og fáa roykburturkastið viðgjørt.

**Talva 5. Serliga dálkandi burturkast**

| Tilfar | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Akkumulatorar, tons | 35,9 | 84,4 | 90,5 |
| Máling, tons | 25,6 | 15,6 | 20,1 |
| Fotoveskur, tons | 1,0 | 1,6 | 3,7 |
| Spilloljuslamm, tons | 125,5 | 25,5 | |
| Deksvatn – oljuboring, tons | 59,8 | | |
| Roykburturkast, tons | 686,4 | | |
| Annað, tons | 12,7 | 5,0 | 6,8 |

### Rottangatøming

Rottangabilarnir tømdu 4.160 rottangar í IRF limakommununum í 2007. Hetta lutfalsliga lága talið kemur av, at IRF tømdi 1.099 rottangar og reinsiverkini í Tórshavnar Kommunu ein part av árinum (Talva 6). Hetta svarar til, at helvtin av húskjunum í Tórshavnar Kommunu hava fingið rottangan tømdan.

**Talva 6. Tøming av rottangum**

| Rottangatøming | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Tømdir rottangar | 4.160 | 6.378 | 7446 |



# Búskapur

### Nýttur roknskaparháttur

Roknskapurin er settur upp eftir roknskaparlógini. Fíggjarstøðan er sett upp í kontohátti, meðan rakstrarroknskapurin er settur upp í frásagnarformi, sundurbýttur eftir slagi. Roknskapirnir fyri ávikavist Spilloljuverkið, verkstaðið, rottangaskipanina, vandarmikla burturkastið og endurnýtsluskipanina eru settir upp fyri seg í serligum notum, og eru allir við í høvuðsroknskapinum. Roknskaparárið er álmanakkaárið.

## Rakstrarroknskapurin

### Tíðargreining

Inntøkur og útreiðslur verða førdar í tí roknskaparári, tær hoyra til, uttan mun til, nær goldið verður.

Útreiðslunar eru soleiðis roknaðar við tað árið, vøran ella tænastan er móttikin, og inntøkunar tað árið, rætturin til tær er fingin.

### Sundurbýting

Inntøkur og útreiðslur eru nágreiniliga býttar sundur eftir slagi.

### Avskrivingar

Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð og verða gjørdar við eins stórum prosentparti, sum niðanfyri tilskilað:

| | |
|---|---|
| Bygningur | 26 ár |
| Skrivstovuinnbúgv v.m. | 3-10 ár |
| Maskinútgerð | 15 ár |
| Bilar | 10 ár |
| Bingjur | 7 ár |
| Ruskpláss | 15 ár |
| Spilloljuverkið | 20 ár |

### Skattur

Sum interkommunalt lutafelag kemur felagsskapurin ikki undir skattskyldu.

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Allar materiellar støðisognir eru tiknar við til keypsviðrið minus samlaðar avskrivingar. Tól, ið kosta minni enn 20 t.kr., verða útreiðsluførd, tó undantikið bingjur.

Allar materiellar støðisognir eru tiknar við til keypsvirði minus samlaðar avskrivingar. Avskrivingartíðarskeiðið fyri bygningar er í 2007 lækkað úr 40 árum niður í 26 ár. Hetta er gjørt á tann hátt, at sjálv brennistøðin er niðurskrivað við kr. 24.211.807 beinleiðis yvir eginognina.

### Ogn í umferð

Vørur á goymslu á verkstaðnum eru tiknar við í ogn í umferð til kostprís.

Skuldarar eru tiknir við við bókaðum virði. Tapsvandin er gjørdur upp fyri hvønn einstakan skuldara og er drigin frá.

### Veðsetingar v.m.

Lánini frá Føroya Banka er tryggja við veð í matr. nr. 428b, Leirvík.

Áognin mótvegis Tórshavnar Kommunu kr. 699.838 er upptikin til fult virði. Málið liggur í rættinum.

Áognin mótvegis SEV, kr. 3.225.600 í sambandi við arbeiði av uppruddingini í Vági er upptikin til fult virði. SEV er ikki samt við IRF um gjaldið fyri arbeiðið.

IRF hevur undirskrivað leigusáttmála, um leigu av høli fram til 2011. Leigan er kr. 195.000 árliga.

# Høvuðstøl

| Kr. x 1000 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2.004 | 2.005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | | | |
| Limagjald | 32.596 | 35.399 | 37.097 | 39.062 | 41.419 | 41.509 | 41.242 | 41.962 | 42.445 |
| Aðrar inntøkur | 14.801 | 15.389 | 17.872 | 18.024 | 17.634 | 18.768 | 18.933 | 19.645 | 29.317 |
| **Inntøkur tils.** | **47.397** | **50.788** | **54.969** | **57.086** | **59.053** | **60.278** | **60.175** | **61.607** | **71.762** |
| **Útreiðslur** | | | | | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur | 32.726 | 35.816 | 38.319 | 41.723 | 40.320 | 42.156 | 41.808 | 45.510 | 50.313 |
| Rentuútreiðslur | 4.619 | 4.985 | 5.196 | 4.698 | 4.178 | 3.203 | 2.968 | 2.861 | 2.656 |
| Avskrivingar | 6.727 | 6.436 | 7.013 | 7.834 | 8.313 | 8.872 | 8.888 | 9.969 | 10.999 |
| **Útreiðslur tils.** | **44.071** | **47.237** | **50.528** | **54.255** | **52.811** | **54.231** | **53.665** | **58.340** | **63.967** |
| **Úrslit** | **3.325** | **3.551** | **4.441** | **2.831** | **6.242** | **6.047** | **6.510** | **3.267** | **7.795** |

Inntøkur 1999-2007 1.000 kr.




Útreiðslur 1999-2007 1.000 kr.




Rakstrarúrslit aftan á avskrivingar og rentur 1999-2007 1.000 kr.




Eginogn 1999-2007 1.000 kr.



# Frágreiðing til ársroknskapin

### Inntøkur

Samlaðu inntøkurnar vóru uml. 71,8 mió.kr sum er 10,1 mió. kr. hægri enn í 2006

### Útreiðslur

